**8. flokkur**
**Vágs skúli**

Ungdómstingið

**Ungdómstingmál nr. 7/2012: Uppskot til samtyktar um at strika meirvirðisgjaldið á frískari frukt og grønmeti**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at fyrireika og leggja fram lógaruppskot um at strika meirvirðisgjaldið á frískari frukt og grønmeti.

**Viðmerkingar**
Í dag skulu øll gjalda 25 % í meirvirðisgjaldi (mvg) fyri fríska frukt og grønmeti. Tað átti at viðført stóra lækking í prísinum, tá meirvirðisgjaldið fyri fríska frukt og grønmeti verður tikið av.

Heilsumyndugleikarnir heita javnan á børn og vaksin um at eta meira frukt og grønmeti, tí at hetta er so heilsugott. Tá frukt og grønmeti er vorðið bíligari, fer keypihugurin at blíva størri, og fólk fara at eta meira av hesi vøru.

Um landið ikki hevur ráð til at strika mvg av frískari frukt og grønmeti, ber til at gera eitt uppskot, har mvg verður strikað av frískari frukt og grønmeti, umframt at mvg verður hækkað á tubbaksvørum og ósunnum vørum.

**Á Løgtingi, 6. februar 2012**

| | | |
|---|---|---|
| Nancy Poulsen | Svanna Olsen | Ólavur Ludvig |
| Jákup Poulsen | Eyrið Mortansdóttur | Pætur Leo |
| Marita Thorteinsson | Gutti Kristiansen | Rani Johansen |